FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Argir**, 14. januar 2013

**J.Nr.:** 010401-002/12-7

**Viðgjørt:** HKV

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 72/2012: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar ”Forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2013”**

**Uppskot**

**til**

**ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2013"**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot (skjal 1) "Forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2013".

**Viðmerkingar**
Við hesum uppskoti verður mælt til, at danska heildarveitingin til Føroyar verður prístalsviðgjørd í 2013. Hetta hevur við sær, at veitingin hækkar við 8,1 mió. kr., upp í 632,2 mió. kr.

Í 2012 ynskti landsstýrið somuleiðis, at heildarveitingin skuldi prístalsviðgerast, og hetta hevði við sær, at veitingin hækkaði úr 615,5 mió. kr. upp í 624,1 mió. kr.

Heildarveitingin verður prístalviðgjørd við sama PL-indeksi (*pris- og lønindeks)* sum aðar líknandi játtanir á donsku fíggjarlógini, og fyri 2013 hækkar PL-indeks við 1,3%. Sambært Hagstovu Føroya hækkaði prístalið 2,4% frá 3. ársfjórðingi 2011 til 3. ársfjórðing í 2012. Um talan verður um sama prísvøkstur komandi ár, verður samanlagt talan um eina *reala* lækking á 1,1% av heildarveitingini í 2013.

**Fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum eru, at landskassin fær 632,2 mió. kr. í inntøkum í 2013. Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar við sær.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Fylgiskjøl:**

**Skjal 1:** "Forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2013" við viðmerkingum.

Fíggjarmálaráðið 14. januar 2012

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason